# Fiskimálaráðið

| | |
|---|---|
| Dagfesting: | 11-01-2021 |
| Mál nr.: | 20/00592-2 |
| Málsviðgjørt: | |
| Ummælisfreist: | 11-01-2021 til 25-01-2021 |
| Eftirkannað: | Lógartænastan dagfestir |

**Uppskot til**

**Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um sjófeingi (Sjófeingislógin)**
(Heimild hjá landsstýrismanninum at krevja rættindahavarar eftir upplýsingum og at taka veiðirættindi aftur, strika treytina um veiðiloyvi og fiskiloyvi í bólki 5 í sambandi við ávíst slag av vinnuligum royndum og verkætlanum ávikavist fyri royndarfiskiskap og vinnuligar fiskiroyndir)

**§ 1**

Í løgtingslóg nr. 152 frá 23. desember 2019 um sjófeingi (Sjófeingislógin), sum broytt við løgtingslóg nr. 59 frá 13. mai 2020, § 78 í løgtingslóg nr. 91 frá 7. juni 2020, løgtingslóg nr. 106 frá 29. juni 2020, løgtingslóg nr. 185 frá 18. desember 2020 og løgtingslóg nr. 186 frá 18. desember 2020, verða gjørdar hesar broytingar:

**1.** § 11, stk. 8 verður orðað soleiðis:
“*Stk. 8.* Í sambandi við eftirkanning av treytunum í hesi grein kann landsstýrismaðurin krevja upplýsingar og váttanir frá eigaranum av fiskifarinum og rættindahavaranum og krevja, at eigarin av fiskifarinum og rættindahavarin útvegar upplýsingar og váttanir frá nevndarlimum, stjórn, ráðgevum, fíggingarstovnum o.ø. Landsstýrismaðurin kann krevja føroyska týðing av skjølum.”

**2.** Í § 11, stk. 9 verður aftan á 1. pkt. sum nýtt pkt. sett: “Hevur rættindahavarin ikki veiðiloyvi, og lýkur hann ikki treytirnar í hesi grein, falla øll veiðirættindini hjá rættindahavaranum aftur til landið.”

**3.** Í § 12 verður aftan á stk. 3 sum nýtt stk. sett:
“*Stk. 4.* Í sambandi við eftirkanning av treytunum í hesi grein kann landsstýrismaðurin krevja upplýsingar og váttanir frá eigaranum av fiskifarinum og rættindahavaranum og krevja, at eigarin av fiskifarinum og rættindahavarin útvegar upplýsingar og váttanir frá nevndarlimum, stjórn, ráðgevum, fíggingarstovnum o.ø. Landsstýrismaðurin kann krevja føroyska týðing av skjølum.”
Stk. 4 verður eftir hetta stk. 5.

**4.** Í § 12, stk. 4, sum verður stk. 5, verður aftan á 1. pkt. sum nýtt pkt. sett: “Hevur rættindahavarin ikki veiðiloyvi, og lýkur hann ikki treytirnar í stk. 3, falla øll veiðirættindini hjá rættindahavaranum aftur til landið.”

**5.** § 14, stk. 2 og 3 verða strikað.

**6.** § 49, stk. 1 verður orðað soleiðis: “Av kvotunum av svartkjafti, norðhavssild og makreli, sambært § 14, stk. 1 og § 15 og rættindum sambært § 17, verða í minsta lagi 50% latin til vinnuligar royndir og verkætlanir, ið hava við sær menning, nýskapan og virðisøking í gagnnýtsluni av nevndu fiskasløgum. Av nøgdini sambært 1. pkt. kann kvota eisini verða latin umsøkjarum í sambandi við verkætlan, ið fevnir um ítøkiligt keyp umsøkjarans av fiskifari uttan veiðiloyvi ella uttan fiskiloyvi í bólki 5, sum tó, áðrenn endalig tilsøgn kann verða givin, lýkur treytirnar sambært § 5, stk. 1, nr. 2-5. Tilsøgn um kvotu sambært 2. pkt. verður latin, um landsstýrismaðurin við støði í umsóknartilfarinum og umstøðunum annars metir, at íløgan í fiskifarið kann bera seg við teimum minstu nøgdunum, ið søkt verður um. Fiskifar, ið ikki frammanundan hevur veiðiloyvi, ávikavist fiskiloyvi í bólki 5, er avmarkað til bert at fiska av tillutaðu nøgdunum sambært endaligu tilsøgnini uttan so, at annað er ásett í løgtingslógini. Fiskifar, ið ikki frammanundan hevur veiðiloyvi, ávikavist fiskiloyvi í bólki 5, fær ikki veiðiloyvi, ávikavist fiskiloyvi, við støði í rættindum latin sambært hesum stykki, samanber tó stk. 4, 3. pkt. Umsøkjarar skulu lúka treytirnar ásettar í stk. 3, og umsøkjarar eftir kvotum sambært 1. pkt. skulu harumframt lúka treytirnar ásettar í stk. 5.”

**7.** § 49, stk. 5 verður orðað soleiðis: “*Stk. 5.* Endalig tilsøgn um kvotu sambært stk. 1, 1. pkt. er treytað av, at umsøkjari innan ávísa tíðarfreist knýtir vinnuligu royndina ella verkætlanina sambært stk. 1, 1. pkt. at ávísum fiskifari við veiðiloyvi ella við fiskiloyvi í bólki 5.”

**8.** § 49, stk. 6 verður orðað soleiðis: “*Stk. 6.* Landsstýrismaðurin letur fiskifari við veiðiloyvi ella við fiskiloyvi í bólki 5 serstakt fiskiloyvi til at fiska av kvotu fevnd av stk. 1, 1. pkt. Somuleiðis letur landsstýrismaðurin fiskifari uttan veiðiloyvi ella uttan fiskiloyvi í bólki 5 serstakt fiskiloyvi til at fiska av kvotu sambært stk. 1, 2. pkt. og stk. 2.”

**9.** § 49, stk. 7 verður orðað soleiðis: “*Stk. 7.* Í sambandi við kvotur til vinnuligar royndir og verkætlanir, sambært stk. 1, 1. pkt., kann landsstýrismaðurin í serligum førum geva undantak frá kravinum um veiðiloyvi sambært stk. 5.”

**10.** § 49, stk. 8 verður orðað soleiðis: “*Stk. 8.* Broytingar í viðurskiftunum sambært hesi grein skulu góðkennast av landsstýrismanninum. Ætlaðar broytingar skulu fráboðast landsstýrismanninum, áðrenn broytingarnar kunnu fara fram. Broytast viðurskiftini soleiðis, at tey ikki eru samsvarandi hesi grein ella galdandi treytum í tilsøgn, kann landsstýrismaðurin krevja, at viðurskiftini koma í rættlag innan nærri ásetta tíðarfreist, um útlit eru fyri tí. Koma viðurskiftini ikki í rættlag innan tíðarfreistina, ella eingi útlit eru fyri tí, kann landsstýrismaðurin taka tilsøgnina aftur, og rættindini falla aftur til landið.”

**11.** § 50, stk. 1 og 2 verða orðað soleiðis: “Landsstýrismaðurin kann, uttan mun til galdandi avmarkingar eftir hesi

løgtingslóg, eftir ummæli frá Havstovuni, lata fiskifari við veiðiloyvi ella við fiskiloyvi í bólki 5 serstakt fiskiloyvi til royndarfiskiskap ella til fiskiskap, sum er liður í eini undirvísingarætlan. Somuleiðis kann landsstýrismaðurin, uttan mun til galdandi avmarkingar eftir hesi løgtingslóg, eftir ummæli frá Havstovuni, lata fiskifari uttan veiðiloyvi ella uttan fiskiloyvi í bólki 5 serstakt fiskiloyvi til royndarfiskiskap ella til fiskiskap, sum er liður í eini undirvísingarætlan.

*Stk. 2.* Landsstýrismaðurin kann í serligum førum geva undantak frá kravinum um føroyskt skrásett fiskifar."

**12.** § 50, stk. 4, 2. pkt. verður orðað soleiðis: "Hóast fiskifarið skal lúka treytirnar sambært § 5, stk. 1, nr. 2-5, er tað ikki ein treyt, at umsóknin er knýtt at ávísum fiskifari við veiðiloyvi ella við fiskiloyvi í bólki 5."

**13.** § 50, stk. 5 verður orðað soleiðis: "*Stk. 5.* Fiskifar, ið ikki frammanundan hevur veiðiloyvi, er avmarkað til bert at fiska av tillutaðu nøgdunum sambært endaligu tilsøgnini, uttan so annað er ásett í løgtingslógini. Er loyvi givið ávísum fiskifari til royndarveiðu, sambært stk. 1, eftir ávísum fiskaslagi í samanhangandi tíðarskeið áljóðandi í minsta lagi 5 ár, kann landsstýrismaðurin eftir umsókn lata fiskifari fiskiloyvi til ávísa fiskaslagið, um mett verður, at grundarlag er fyri varandi og burðardyggum fiskiskapi, og treytirnar í royndarloyvinum annars hava verið loknar, og loyvishavarin lýkur vanligu treytirnar ásettar í §§ 11-13. Fiskifarið fær tá veiðiloyvi, ávikavist fiskiloyvi í bólki 5, um fiskifarið frammanundan ikki hevur veiðiloyvi, ávikavist fiskiloyvi, og rættindini til ávísa fiskaslagið verða tá knýtt at tí ávísa fiskifarinum í fiskiloyvi."

**§ 2**

Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

## Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

### 1.1. Orsakir til uppskotið

Løgtingið hevur í 2020 samtykt lóg um ikki at luta út kvotur til vinnuligar royndir og verkætlanir, sambært § 49, stk. 1, í 2020. Ætlanin er heldur at lýsa eftir vinnuligum royndum og verkætlanum í 2021, har eisini kvotur av svartkjafti verða partur av samlaða kvotugrundarlagnum, ið søkjast kann eftir, eins og møguleiki skal vera fyri at søkja um kvotu í sambandi við ítøkiligt keyp av fiskifari, uttan at seta fiskifarinum treyt um veiðiloyvi, soleiðis at nýggir aktørar við egnum fiskiførum kunnu sleppa framat fiskirættindum, um mett verður, at grundarlag er fyri at ganga tílíkari umsókn á møti. Fiskiiør uttan veiðiloyvi kunnu tó bert fiska av kvotum sambært § 49, stk. 1, 2. pkt. og § 50, stk. 1 og 4 (royndarfiskiskapur og vinnuligar fiskiroyndir).

### 1.2. Galdandi lóggáva

Sambært galdandi løgtingslóg ber ikki til at fáa kvotur til vinnuligar royndir og verkætlanir til egið fiskifar uttan veiðiloyvi, eins og tað er sett sum treyt fyri royndarfiskiskapi og vinnuligum fiskiroyndum, at kvotan verður fiskað við fiskifari við veiðiloyvi, sbr. § 50, stk. 1 og 4. Treytin um veiðiloyvi ger tað sostatt sera avbjóðandi hjá nýggjum aktørum at reka vinnuligan fiskiskap við egnum fiskifari, tí teir mugu hava fiskifar við veiðiloyvi.

**1.3. Endamálið við uppskotinum**
Eitt av endamálunum við uppskotinum er, at tað skal bera til at fáa lut í kvotu til vinnuligar royndir og verkætlanir í sambandi við skipakeyp uttan treyt um veiðiloyvi, sbr. § 49, stk. 1, 2. pkt. Hetta merkir tó, at viðkomandi rættindahavari bert kann fiska tær í tilsøgnini nevndu nøgdir við egnum fiskifari uttan veiðiloyvi, uttan so at annað er ásett í løgtingslógini t.d. at fiska kvotur sambært § 50, stk. 1 og 4.

**1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum**
Nýskipanin er, at kvota kann verða latin í sambandi við ítøkiligt keyp av fiskifari uttan veiðiloyvi, sum, við støði í tillutaðum rættindum til vinnuligar royndir og verkætlanir, royndarfiskiskap og vinnuligar fiskiroyndir, kann troyta hesi rættindi uttan veiðiloyvi ella fiskiloyvi í bólki 5 við tí fiskifari, sum nevnt er í tilsøgnini.

**1.5. Ummæli og ummælisskjal**
...

**Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum**

**2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur**
Ongar útreiðslur eru av lógaruppskotinum, og lógaruppskotið er ikki partur av broytingum í einum samlaðum lógarverki.

**2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur**
Fyri landið hevur broytingin við sær, at fortreytirnar fyri umsitingarliga arbeiðinum at orða metingarskjøl, oyðibløð, kunngerðir, tilmæli, avgerðarskriv o.a. í sambandi við vinnuligar royndir og verkætlanir, sambært § 49, stk. 1, verða broyttar í mun til treytir, fiskasløg og nøgdir, og tað arbeiðið skal sostatt í ávísan mun tillagast nýggju fortreytunum.

**2.3. Avleiðingar fyri vinnuna**
Uppskotið hevur jaligar avleiðingar fyri vinnuna, tí við uppskotinum kann vinnan søkja um størri nøgdir enn í 2020, eins og møguleiki verður fyri at fáa lut í svartkjaftakvotu, samstundis sum møguleiki verður fyri at søkja um kvotu í sambandi við ítøkiligt keyp av fiskifari. Tó skulu umsøkjarar helst tillaga verandi umsóknartilfar ella senda inn nýtt umsóknartilfar.

**2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið**
Mett verður ikki, at uppskotið hevur avleiðingar fyri umhvørvið.

**2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum**
Mett verður ikki, at uppskotið hevur avleiðingar fyri serstøk øki í landinum.

**2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir**
Mett verður ikki, at uppskotið hevur avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir.

**2.7. Millumtjóða sáttmálar á økinum**
Mett verður ikki, at uppskotið hevur avleiðingar fyri millumtjóða sáttmálar á økinum.

**2.8. Tvørgangandi millumtjóða sáttmálar**

1) **Hoyvíkssáttmálin**
   Uppskotið verður ikki mett at hava nakrar avleiðingar fyri Hoyvíkssáttmálan.

2) **Evropeiski mannarættindasáttmálin, EMRS**
   Uppskotið verður ikki mett at hava nakrar avleiðingar fyri EMRS.

3) **Sáttmáli Sameindu Tjóða um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek**
   Uppskotið verður ikki mett at hava nakrar avleiðingar fyri Sáttmála Sameindu Tjóða um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek.

**2.9. Markaforðingar**
Mett verður ikki, at nakrar markaforðingar eru á økinum.

**2.10. Revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv**
Lógaruppskotið hevur ikki ásetingar um revsing, fyrisitingarligar sektir ella pantiheimildir. Tó heimilar uppskotið landsstýrismanninum at taka aftur veiðirættindi hjá rættindahavarum í fiskivinnuni, ið ikki hava veiðiloyvi, sbr. broytingarnar til §§ 11 og 12 í uppskotinum. Sum er, er eingin heimild hjá landsstýrismanninum eftir nevndu ásetingum at taka nøkur veiðirættindi aftur frá rættindahavarum, ið virka uttan veiðiloyvi, t.d. sum hava fingið ískoytis- ella menningarkvotur uttan treyt um veiðiloyvi, ella sum eftir uppskotinum kunnu fáa kvotur til keyp av fiskifari ella til royndarfiskiskap og vinnuligar fiskiroyndir uttan treyt um veiðiloyvi.

**2.11. Skattir og avgjøld**
Ongar ásetingar eru í uppskotinum viðvíkjandi skatti og avgjøldum.

**2.12. Gjøld**
Ongar ásetingar eru í uppskotinum viðvíkjandi gjøldum.

**2.13. Áleggur lógaruppskotið likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur?**
Landsstýrismaðurin kann við broytingunum til §§ 11 og 12 krevja upplýsingar.

**2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrismannin, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur?**
Nei.

**2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?**
Nei.

**2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?**
Nei.

**2.17. Talvan: Yvirlit yvir avleiðingarnar av lógaruppskotinum**

| | Fyri landið ella landsmyndug-leikar | Fyri kommunalar myndugleikar | Fyri pláss ella øki í landinum | Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|---|
| Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar | Ja | Nei | Nei | Nei | Ja |
| Umsitingarligar avleiðingar | Ja | Nei | Nei | Nei | Ja |
| Umhvørvisligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Sosialar avleiðingar | | | Nei | Nei | |

## Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

### 3.1. Viðmerkingar til ta einstøku greinina

**Til nr. 1 og 3**
Í sambandi við eftirkanning av treytunum um ognarviðurskifti kann landsstýrismaðurin krevja upplýsingar og váttanir frá eigaranum av fiskifarinum og krevja, at eigarin av fiskifarinum útvegar upplýsingar og váttanir frá nevndarlimum, stjórn, ráðgevum, fíggingarstovnum o.ø. Landsstýrismaðurin kann krevja føroyska týðing av skjølum.

Samanfall er ikki altíð millum eigaran av fiskifarinum og rættindahavaran. Tí er neyðugt eisini at kunna krevja upplýsingar og váttanir frá rættindahavaranum.

Grein 11, stk. 8 verður tí broytt, soleiðis at ikki bara eigarin av fiskifarinum, men eisini rættindahavarin kann verða kravdur at útvega upplýsingar í sambandi við eftirkanning av treytum um ognarviðurskifti.

Sama áseting verður sett inn í skiftisregluna í § 12 fyri verandi feløg, so eingin ivi er um, at kravið um at útvega upplýsingar eisini er galdandi fyri feløg, ið eru fevnd av skiftisregluni.

**Til nr. 2 og 4**
Avleiðingin, um at treytin um ognarviðurskifti ikki er lokin, er, at veiðiloyvið fellur aftur til landið. Tá veiðiloyvið fer úr gildi, fara øll veiðirættindi samstundis úr gildi sambært § 7, stk. 1.

Við hesi lógarbroyting verður skotið upp, at tað skal bera til at fiska kvotur í sambandi við royndarfiskiskap og vinnuligar fiskiroyndir uttan veiðiloyvi. Tí er neyðugt at tillaga reglurnar um, hvørjar avleiðingarnar eru av ikki at lúka treytirnar um ognarviðurskifti.

Í § 11, stk. 9 og § 12, stk. 4 (sum verður til § 12, stk. 5 við uppskotinum) verður ásett, at um rættindahavari uttan veiðiloyvi ikki lýkur treytirnar um ognarviðurskifti, falla øll

veiðirættindini hjá rættindahavaranum aftur til landið. Harvið missir rættindahavarin eisini møguleikan fyri at fáa veiðiloyvi við støði í rættindunum, ið rættindahavarin hevur.

**Til nr. 5**
Av tí, at § 14, stk. 2 og 3 bert høvdu virknað fyri 2020, tí talan var um at flyta ófiskaðar meningarkvotur frá 2018 til at verða fiskaðar í 2020, eru ásetingarnar óneyðugar at hava í lógini eftir 2020.

**Til nr. 6**
Ásetingin hevur við sær, at kvotur til vinnuligar royndir og verkætlanir, har umsøkjari eisini skal vísa á fiskifar við veiðiloyvi ella við fiskiloyvi í bólki 5, eru fevndar av 1. pkt. Ásetingin í 2. pkt. heimilar landsstýrismanninum at luta kvotu út til umsøkjarar í sambandi við keyp umsøkjarans av fiskifari uttan treyt um veiðiloyvi ella fiskiloyvi í bólki 5. Broytingin hevur við sær, at tað ikki er neyðugt hjá umsøkjara at hava veiðiloyvi til at fiska júst kvotuna sambært § 49, stk. 1, 2. pkt. Viðkomandi kann tó bert við ítøkiliga fiskifarinum uttan veiðiloyvi og fiskiloyvi í bólki 5 fiska ta tillutaðu kvotuna sambært tilsøgnini, uttan so at annað er ásett í løgtingslógini, t.v.s. eisini kvotur fevndar av § 50, stk. 1 og 4 (royndarfiskiskapur ávikavist vinnuligar fiskiroyndir), um loyvishavari eisini skuldi havt fingið tilsøgn um hetta slagið av fiskiskapi.

Hóast hetta er ásett, at áðrenn endalig tilsøgn kann verða givin, skal fiskifarið lúka treytirnar sambært § 5, stk. 1, nr. 2-5. Sostatt verður arbeitt við einari treytaðari fyribils tilsøgn, áðrenn endalig tilsøgn kann verða latin umsøkjaranum. Endalig tilsøgn er treytað av, um landsstýrismaðurin við støði í tilfari frá umsøkjaranum og upplýsingum annars metir, at íløgan kann bera seg við teimum minstu nøgdunum, ið søkt verður um, og at skipið veruliga er keypt, og beinanvegin er klárt til fiskiskap, sum verður sett sum treyt í kunngerð við heimild í § 49, stk. 1, so virði ikki fara fyri skeytið. Hetta hevur sostatt við sær, at um neyðugt er við munandi størri nøgdum, enn ráðiligt er at geva einum umsøkjara, fellur umsóknin í ráðfestingini. Endamálið er at lata møguligar nýggjar aktørar royna seg sum eigarar av fiskifari, tó uttan so, at øll kvotan bert verður latin einum umsøkjara.

Eftir fimm árum er sambært lógini heimilað landsstýrismanninum at leggja vinnuligu royndarkvotuna um til egna árskvotu við 12 ára gildistíð, um allar treytir hava verið hildnar í loyvistíðarskeiðinum. Vinnuligu royndarkvoturnar verða latnar fyri eitt ár í senn og eftirmettar á hvørjum ári. Allar broytingar í viðurskiftunum skulu sambært stk. 8 framvegis góðkennast av landsstýrismanninum, t.d. um ognarviðurskiftini broytast, ella skipakeypið ikki gjørdist veruligt og varandi, so er heimilað landsstýrismanninum at taka neyðug stig til tess at fáa viðurskiftini í rættlag, haruppií at taka kvotuna aftur.

**Til nr. 7**
Talan er um eina fylgibroyting av uppskotinum til § 49, stk. 1. Hetta merkir, at teir umsøkjarar, sum fáa lut í kvotu sambært § 49, stk. 1, 1. pkt., framvegis skulu lúka treytina um at vísa á fiskifar við veiðiloyvi ella fiskiloyvi í bólki 5.

**Til nr. 8**
Talan er um eina fylgibroyting av uppskotinum til § 49, stk. 1, soleiðis at serstakt fiskiloyvi verður latið fiskiførum við veiðiloyvi og fiskiloyvi í bólki 5 í sambandi við kvotur sambært § 49, stk. 1, 1. pkt. ávikavist uttan veiðiloyvi og fiskiloyvi í bólki 5 í sambandi við kvotur sambært § 49, stk. 1, 2. pkt. og stk. 2.

**Til nr. 9**
Ásetingin merkir, at tað bara er í mun til § 49, stk. 1, 1. pkt., at landsstýrismaðurin kann geva undantak frá treytini um veiðiloyvi. At fiska av kvotum sambært § 49, stk. 1, 2. pkt. verður við lógarbroytingini undantikið treytini um veiðiloyvi í mun til júst tær nøgdirnar, eins og tað longu er galdandi fyri ískoytiskvoturnar sambært § 49, stk. 2.

Fyri at landsstýrismaðurin, sambært § 49, stk. 1, 1. pkt., skal kunna geva fiskiførum undantak frá treytini um veiðiloyvi, er høvuðsreglan framhaldandi, at bara føroyskt skrásett fiskifør við veiðiloyvi kunnu fáa serstakt loyvi til at fiska kvotur til vinnuligar royndir og verkætlanir sambært § 49, stk. 1, 1. pkt. Heimild er tó at víkja frá hesum kravi í serligum føri, t.d. tá talan er um vinnuligar royndir og verkætlanir sambært stk. 1, 1. pkt., sum krevja serlig fiskifør ella tøkni, sum als ikki er tøk í føroyska fiskiflotanum.

**Til nr. 10**
Greinin verður nágreinað soleiðis, at landsstýrismaðurin eisini fær heimild at taka tillutað rættindi aftur, um ikki treytir í tilsøgn verða hildnar, ella útlit ikki eru fyri tí, t.d. tí at ítøkiliga skipakeypið ikki verður til nakað kortini, ella aðrar umstøður, ið gera seg galdandi. Í viðgerðini skal landsstýrismaðurin tó altíð umhugsa tað minst byrðandi inntrivið í mun til grovleikan.

**Til nr. 11-12**
Treytin um veiðiloyvi verður strikað, og tískil er tað ikki ein treyt, at fiskifarið hevur veiðiloyvi fyri at fáa loyvi til royndarfiskiskap ella vinnuligar fiskiroyndir sambært § 50, stk. 1 og 4. Vikið verður somuleiðis frá treytini í mun til treytina um fiskiloyvi í bólki 5. Sama fiskifar kann uttan veiðiloyvi og fiskiloyvi í bólki 5 í mesta lagi fáa tillutað rættindi at fiska kvotu sambært § 49, stk. 1, 2. pkt., stk. 2 og § 50, stk. 1 og 4.

**Til nr. 13**
Talan er um eina nágreining, tí verandi orðing er ikki nóg greið, tá ið hugtakið "royndarveiðu" verður nýtt í mun til heimildina at leggja um. Talan er bert um royndarfiskiskapin sambært stk. 1. Um treytir í lóggávuni annars eru loknar, kann landsstýrismaðurin eftir í minsta lagi fimm árum geva ávísa fiskifarinum varandi loyvi til at fiska ávíst fiskaslag, sum roynt hevur verið eftir. Um fiskifarið, sum brúkt er gjøgnum øll árini til royndarfiskiskapin, ikki hevur veiðiloyvi frammanundan, kann tað tá fáa veiðiloyvi, um treytir fyri hesum sambært lógini annars eru loknar í loyvistíðarskeiðinum, og um landsstýrismaðurin velur at brúka heimildina. Um fiskifarið hinvegin hevur veiðiloyvi frammanundan, kann fiskifarið tá fáa varandi fiskiloyvi til at troyta tey rættindi, sum vóru latin sambært § 50, stk. 1. Sami møguleiki ger seg ikki galdandi viðvíkjandi vinnuligum fiskiroyndum sambært § 50, stk. 4.

**Til § 2**
Uppskotið kemur í gildi dagin eftir, at tað er kunngjørt.

Fiskimálaráðið, dagfesting.

**Jacob Vestergaard**
landsstýrismaður

/ Rógvi Reinert

**Yvirlit yvir fylgiskjøl:**
Fylgiskjal 1: Javntekstur
Fylgiskjal 2:
Fylgiskjal 3: